## Kunngerðaportalurin og Lógasavnið – hvat er munurin?

Lógartænastan hevur tvær lógarskipanir undir hond: Kunngerðaportalin og Lógasavnið (logir.fo).

Munurin á teimum er í stuttum hesin:




**Kunngerðaportalurin – har lógir verða kunngjørdar og fáa løggildi**

Kunngerðarportalurin hýsir Kunngerðablaðnum.

Í Kunngerðablaðið skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, givnar av landsstýrinum, kunngerast fyri at fáa lóggildi.

Rættarreglur, sum verður kunngjørdar á Kunngerðaportalinum, verða ongantíð strikaðar og ongantíð broyttar á nakran hátt. Tær fáa t.d. heldur ikki nakað frámerki, har tað sæst, um tær eru galdandi ella kanska farnar úr gildi. Har eru heldur ikki nakrar slóðir, ið vísa sambond millum rættarreglurnar.

Frá 1. januar 2013 eru løgtingslógir, kunngerðir o.s.fr. einans givnar út talgilt á Kunngerðaportalinum og ikki í pappírsútgávu sum áður. Rættarreglur, kunngjørdar undan hesi dagfesting, kunnu ikki leitast fram á Kunngerðaportalinum.

**Lógasavnið logir.fo - har tú leitar fram galdandi lóggávu**
Logir.fo er ein skipan, hvørs høvuðsendamál er, at borgarin ómakaleyst skal kunna leita fram alla galdandi lóggávu í Føroyum.

Nógv er gjørt fyri at lætta um hjá borgaranum, tá ið hann skal gera seg kunnugan við og leita fram lóggávu í Lógasavninum – úr rúgvuni av hentleikum kann nevnast:

Rættarreglurnar í lógasavninum fáa ymisk frámerki. Tað sæst m.a., um rættarreglurnar eru galdandi ella ikki.

Broytingar, ið verða gjørdar í lógum, verða skrivaðar inn í upprunalóginar, so høvuðslógirnar altíð kunnu síggjast í fullum galdandi líki.

Slóðir eru frá løgtingslógum til løgtingsmál, og slóðir eru eisini millum rættarreglur, so til ber at síggja sambond millum rættarreglurnar. Eitt nú sæst, hvørjar kunngerðir knýta seg at einari løgtingslóg, hvørjar broytingarlógir, ið knýta seg at einari høvuðslóg, og hvørjar lógir taka aðrar lógir av.

Umframt galdandi lóggávu hevur lógarsavnið frá 1. januar 1999 allar tær ásetingar, sum eru kunngjørdar í Kunngerðablaðnum. Eldri ásetingar, ið vóru farnar úr gildi fyri 1. januar 1999, eru tó ikki at finna í logir.fo

**Ósamsvar millum Kunngerðaportalin og logir.fo**
Er ósamsvar millum tekstin í Lógasavninum og Kunngerðarporalinum, er tað altíð tann kunngjørdi teksturin á Kunngerðaportalinum, ið er løgfrøðiliga bindandi.

**Hvar varð kunngjørt?**

| | |
|---|---|
| 1897 | Frá 1. januar 1897 verða lógir fyri Føroyar kunngjørdar í *Lovtidende*, harumframt skuldi dagfesting, nummar og lógheiti verða kunngjørt í *Dimmalætting*, Færø Amtstidende. |
| 1940 | Frá 1940 verða allar lógir, samtyktar á løgtingi, eisini savnaðar í Føroya Kunngerðasavni, Færøernes Kundgørelsessamling. *Dimmalætting* er tó framvegis løggildi kunngerðamiðilin. |
| 1988 | Frá 1. oktober 1988 verða løgtingslógir og kunngerðir kunngjørdar í *Kunngerðablaðnum*, ið seinni fær heitið Kunngerðablað A. |
| 1990 | Frá 1. januar 1990 verða ríkislógir og ríkiskunngerðir kunngjørdar í *Kunngerðablaðnum B*. |
| 2013 | Frá 1. januar 2013 verða bæði Kunngerðablaðið A og B givin út talgilt á Kunngerðaportalinum. |

**Hvar finni eg kunngjørt tilfar?**

*Lovtidende*
Frá 1. januar 2008 er Lovtidende givið út talgilt á lovtidende.dk
Eldri árgangir av Lovtidende eru enn einans at finna í pappírsformi og kunnu, eitt nú útvegast umvegis bókasøvnini.

*Dimalætting*
Dimmalætting – allir árgangirnir eru at finna á tidarrit.fo

*Kunngerðasavnið*

- Føroya Kunngerðasavn frá 1940 til 2003 er at finna á tidarrit.fo
- Føroya Kunngerðasavn frá 2001 og fram til í dag finst undir slóðini Kunngerðasavnið á logir.fo
- Føroya Kunngerðablað frá 2013 og fram til í dag er eisini at finna á Kunngerðaportalinum.
- Kunngerðasøvnini frá 1940 og fram til í dag eru eisini tøk í pappírsformi á eitt nú Lands-bókasavninum.